# Stórur dagur tá Norðoya Sparikassi kom til Runavíkar

**Orð og myndir: Jonhard Hammer**



*Glaðir Støkk-fimleikarar avmyndaðir saman við stjóranum í Norðoya Sparikassa. Tað var ikki trupult hjá myndamanninum at fáa smílini fram til hesa myndina*



*Kári Sverrisson sang millum annað fyrsta sangin, sum hann kom fram við – sangurin Eru vit til? frá Amensty-útgávuni*



*Elisabeth á Lakjuni sang á móttøkuni, og hon sang framúr væl. Elisabeth kundi saktans komið upp á tal sum besta songkvinna til næsta Planet Awards*



*Nógv fólk stukku inn á gólvið, har Anna Muller Jacobsen, eitt av starvsfólkunum, sá út til at hava nógv at gleðast um hendan dagin*



*Fimleikarar úr Støkk fóru upp á borðið at sýna fram fimleik. Norðoya Sparikassi hevur eina millión krónur til nýggja fimleikahøll, men hendan dagin nýttust fimleikararnir ikki nógv pláss til at gera fimleik á*



*Fólk vóru tikin á bóli, tá ið Eyðfinn Reyðberg, stjóri í Norðoya Sparikassa, handaði støkk ein gávukekk á eina heila millión krónur, og nógv spurdu: Stendur tað ein millión á hasum kekkinum?*



*Gunnar Nolsøe, marknaðarstjóri, hugleiddi um nýggja konseptið, har tað ikki bara snýr seg um pengar og kontur, men eisini um mat og trivnað*